# Sigmundur er nú skrásettur á Toftum

**Skipari og manning fylgja við skipinum, og tað er reiðarin, Jóhannus Olsen, væl nøgdur við.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Besti línubáturin í føroyska fiskiskipaflotanum, Sigmundur, er nú heimahoyrandi á Toftum.

Í vikuni undirskrivaðu P/F Eysturoy á Toftum og P/F Jómar á Norðskála sáttmála um sølu av skipinum.

P/F Eysturoy eigur og rekur frammanundan línuskipið, Eysturoying, og reiðari er Jóhannus Olsen, sum eisini er stjóri hjá P/F Snodd, sum júst hevur bygt nýtt fiskavirki á havnalagnum á Toftum.

**Manningin fylgir skipinum**

Jóhannus sigur, at skipari og manning fylgja við Sigmundi, og tað er hann stak væl nøgdur við, tí línuskipið hevur roynst framúr seinastu árini.

- Tað er ikki av ongum, at tað hevur gingið so væl. Skipari og manning hava virkuliga verið ófør, sigur reiðarin.

Sigmundur verður rikin á sama hátt sum frammanundan, og veiðan verður seld, har mest fæst fyri hana.

Reiðarin vísir á, at tað lutfalsliga er bíligari at reka tvey skip enn bara tað eina.

Spurdur, um P/F Eysturoy hyggur seg um eftir fleiri skipum, sigur hann, at tað er ikki óhugsandi, at okkurt skip kemur aftrat sum frá líður.

- Men tað fer tíðin at vísa, leggur Jóhannus Olsen aftrat.

Keypsprísin vil reiðarin ikki upplýsa.

# Jaspis og Ametyst landa í Saltangará 3. páskadag

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á Fiskavirking í Saltangará verður páskafrítíðin ikki longur, enn hon eigur at verða.

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at týsdagin eftir páskir fara teir at landa partrolararnar, Jaspis og Ametyst. Helst koma teir inn beint fyri páskir.

Trolararnir byrjaðu at fiska fyrst í hesi vikuni, og mikudagin høvdu teir 1500 kassar tilsamans.

Á Fiskavirking í Saltangará landaðu teir Vestmenning mánadagin. Teir høvdu stívliga 200.000 pund, harav 140.000 var upsi.

Virkisleiðarin sigur, at tey byrjaðu at arbeiða kl. 7 týsdagin og mikudagin fyri at verða eitt sindur fyrr liðug mikudagin.

- Tað eru bara tríggir arbeiðsdagar í hesi vikuni, og eg vil siga, at vit hava havt so passaligt at gera.

Væntandi fingu arbeiðsfólkini páskafrí tíðliga seinnapartin mikudagin.

**Smáur upsi**

Jason sigur, at upsin hevur verið smærri enn vanligt í februar og mars.

- Vit plaga altíð at fáa nakað av stórum upsa hesa tíðina, men soleiðis hevur ikki verið í vár. Upsin hevur alla tíðina verið smáur, eisini í gýtingartíðini.

Hann sigur, at vanligt plagdi at vera, at ein partur av upsanum var ov stórur hesa tíðina av árinum.

- Tað er ivaleyst gott, at nógvur smáur upsi er til, men tað undrar, at so lítið er av stórum gýtingarfiski, sigur Jason Johannesen.

# Niels Pauli og Phoenix við nógvari blálongu

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin landaðu djúpvatnstrolararnir, Niels Pauli og Phoenix, tilsamans 460.000 pund av blálongu og kongafiski á Tvøroyri. Niels Pauli hevði 200.000 pund, meginparturin blálonga og kongafiskur, og Phoenix hevði 260.000 pund av blálongu.

Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, sigur, at onnur virkir kring landið keyptu blálonguna, sum verður saltað.

Á Tvøroyri hava tey kortini úr at gera og hava arbeitt yvir hvørt kvøld hesa vikuna.

- Vit hava keypt fisk frá eitt nú Váðasteini, Jaspis og Ametyst, og her er serliga talan um hýsu og tosk, sigur Bjarni.

**Yvirtíð**

Á Fiskavirking á Tvøroyri keyptu tey eisini nakað av veiðini hjá Niels Paula og Phoenix.

- Vit hava arbeitt hvørt kvøld hesa vikuna til kl. 19 og 20 fyri at fáa fiskin undan fyri páskahøgtíðina.

Spurdur, hvussu hann væntar, at dagarnir beint eftir páskir verða, sigur Bjarni Hansen, at hann væntar onkra landing longu týsdagin eftir páskir.

- Vit arbeiða hvønn dag, og vit vænta eisini, at boð verða eftir arbeiðsfólkinum longu 3. páskadag, sigur virkisleiðarin.

# Smyril Line sýnir fram í SMS



Hesa vikuna hevur Smyril Line og Shetland Island Tourism, sum er ferðaráðið í Hetlandi, stóra sølu-framsýning á Torginum í SMS.

Eftir – enn ein – myrkan og kaldan vetur nærkast tíðin, har dagarnir leingjast, og veðrið gerst betur. Og tað er somuleiðis tíðin, tá mong av okkum leggja ætlanir fyri summari sum nærkast. Summi velja at verða verandi heima í Føroyum, meðan onnur velja at fara til uttanlands at halda summarfrí. Eru møguleikarnir nógvir at halda summarfrí í Føroyum, so eru teir ikki færri í útlandinum. Og her er Smyril Line helst tann ferðamannastovan, sum kann bjóða flest møguleikar.

-Í Føroyum hava teir Norðlýsi, sum kann sigla teg og onnur runt ímillum okkara vøkru oyggjar. Teir hava Hotel Føroyar og Vallarheimið við Oyggjarvegin, og afturat hesum kunnu teir hjálpa tær við at finna gistingarmøguleikar aðrastaðni í Føroyum. Umframt gistingarmøguleikum, skipa teir fyri alskyns gongutúrum ymsastaðni í Føroyum við staðkendum ferðaleiðarum.

-At flyta teg til útlandið hava teir Norrønu, sum komandi ár verður skift út við eina nýggja og sera stásiliga Norrønu. Men sum ferðamannastova kann Smyril Line eisini syrgja fyri, at tú kemur loftvegis til útlandið, tí teir selja eisini flogferðaseðlar.

Á Torginum í SMS fer Smyril Line at leggja dent á allar hesar ferðamøguleikarnar, og nógv afturat. Tó verður serligur dentur lagdur á útlandið.

–Danland, Euro Disney, Miðjarahavið og annars hópin av øðrum ferðastøðum. Til tey ungu eru ferðirnar hjá ”ung rejs” serliga vælumtóktar.

Tá gongur leiðin serliga til Miðjarahavið, eitt nú Ibisa og annars ferðastøð á sponsku sóloyggjunum.

Eisini verður dentur lagdur á ferðamøguleikar í Hetlandi. Í hesum samband er eitt umboð frá hetlendska ferðaráðnum, Shetland Islands Tourism, á Torginum.

Í samband við søluframsýningina hevur Smyril Line nøkur tilboð dagarnar søluframsýningin er opin í SMS. Vitjað Torgið í SMS, og avgerð tína summarfrítíð!

Vit síggjast í SMS!



# Scania aftur loysa Dúgvuna av

**Strandferðslan hevur gjørt avtalu við Estlendska Reiðaríið Saaremaa Shipping Company Ldt. um leigu av ferjuni Scaniu í knappar tveir mánaðir. Ferjan skal avloysa Dúgvuna og Smyril, sum skulu til árligt eftirlit**

STRANDFERÐSLAN
*Ragnhild & Solby*

**Klaksvík:**
Ætlanin er, at Scania skal sigla um Leirvíksfjørð frá 3. apríl og umleið fýra vikur fram. Og síðani fer hon at røkja siglingina um Suðuroyarfjørð í umleið tvær vikur.

Scania verður væntandi í Føroyum leygardagin 30. mars.

Poul Jákup Thomsen, ferðafólkaflutningsleiðari á Strandferðsluni, sigur, at tað er sera torført at finna skip at leiga til styttri tíðarskeið. Eisini er tað torført at finna skip, sum hóska til atløguviðurskiftini her á landi.

Scania fer at sigla millum Klaksvík og Fuglafjørð.

- Ferjan er vælegnað til Leirvískfjarðarleiðina, sigur Poul Jákup Thomsen, sum samstundis vísir á, at Strandferðslan veit, at hon ikki er so vælegnað til Suðuroyarsiglingina.

- Vit valdu kortini at taka Scaniu til hesu rutuna eisini, tí hin møguleikin er stutt sagt ongin sigling, og tað kann ikki bera til.

Strandferðslan hevur biðið um loyvi at keypa eitt avloysaraskip, men Landsstýrið hevur ikki heimilda hesum enn, sigur Poul Jákup Thomsen.

Tað er nú umleið eitt ár, síðani Scania var her seinast. Poul Jákup sigur, at norðoyingar eru væl nøgdir við Scaniu, tí hon tekur fleiri bilar og ferðafólk enn Dúgvan. Harvið slepst so gott sum undan bíðitíðini, sum altíð er.

Scania tekur 180 ferðafólk og 80 persónsakfør.




Strandfaraskip Landsins:

# Bjóðar nýggjar tænastur

**- Ár 2002 skal verða árið, har tænastan verður sett í hásætið. Hetta sigur Poul Jákup Thomsen, ferðafólkaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins**

STRANDFERÐSLAN
Ragnhild & Solby

Um hálvan apríl mánaða bjóða Strandfaraskip Landsins eina nýggja heimasíðu út til viðskiftafólkini at nýta.

Á hesu heimasíðu kann ein millum annað verða kunnaður um broytingar á farleiðum hjá Strandferðsluni umvegis sms-boð á fartelefonini.

Tú fert inn á heimasíðuna og teknar teg til tær farleiðir, tú dagliga nýtir. Um so eitt nú Dúgvan ikki siglur, ella siglur á Fuglafjørð, so fært tú eini sms-boð, sum gera vart við hesa broyting. Hendan tænastan verður ókeypis hjá viðskiftafólkunum at nýta.

Á henda hátt sleppur brúkarin undan óvissuni. Tað er ikki altíð, at tað er gjørligt at lýsa so væl, at broytingar eru í ferðaætlanini.

- Men boðtænastan skuldi bøtt munandi um hendan trupulleika, sigur Poul Jákup Thomsen.

Eisini fært tú betri upplýsningar um, hvussu tú á lættasta hátt kanst koma til tey ymsu støðini í landinum.

Um tú til dømis ynskir at sleppa til Fugloyar, so sært tú inni á heimasíðuni, hvussu allir bussar og bátar ferðast, sum tú hevur fyri neyðini til tess at koma til Fugloyar. Óansæð hvar í landinum, tú ert staddur.

Poul Jákup Thomsen sigur, at 2002 er árið, har viðskiftafólki merkir, at Strandfaraskip Landsins er til fyri tey. Eisini er hetta árið, har tænastan verður lyft upp á eitt hægri støði.

Afturat hesum hevur Strandfaraskip Landsins eisini ætlanir um at betra viðurskiftini umborð á skipunum, sum dagliga verða nýtt. Millum annað skulu allar gardinur og øll teppini skiftast út í nærmastu framtíð.

# Hvat halda tit

**Vit hava hitt nøkur fólk á gøtuni fyri at fregnast um, hvat tey halda um nýggju boðtænastuna hjá Strandferðsluni**

FÓLK Á GØTUNI
*Ragnhild & Solby*

**Jan Gardar, deildarleiðari**



Hetta er ein super tænasta, um hon vælsagtans kemur at virka. Sum er, hevur ein onga hóming av, nær Dúgvan er seinkað ella avlýst, ella um hon møguliga siglur á Fuglafjørð.

Avlýsingar verða lýstar alt ov illa, og tí er torført at fylgja við.

Men eg fari avgjørt at melda meg til hesa nýggju tænastuna.

**Anna Múller Jacobsen, Sparikassakvinna**



Eitt smart og gott hugskot, sum eg sjálv uttan iva fari at brúka.

Broytingar í ferðaætlanini verða í løtuni alt ov illa lýstar. Onkuntíð havi eg koyrt úr Havnini til Leirvíkar, men tá eg so eri komin vegin fram, so fái eg at vita, at Dúgvan siglur av Fulgjafirði. Tað er alvorliga ræst.

Annars eri eg eisini glað fyri, at Scania kemur aftur at sigla. Hon tekur nógv fleiri bilar, og av tí sama sleppa øll sum oftast við.

Men hon kundi gott gjørt nakrar seinni túrar eisini, tað hava vit brúk fyri her norðuri.

**Hákun Dam, tryggingarráðgevi**



Hetta ljóðar alletiders. Sum er fara alt ov nógvar broytingar fram, uttan ein veit av nøkrum, og tað er ov vánaligt.

Onkuntíð havi eg bíða í hálvannan tíma eftir Dúgvuni á Fuglafirði, og tað er gyseligt.

Sjálvur komi eg væntandi at gera nógv brúk av Strandferðsluni móti várinum, so eg fari helst at melda meg til hesa tænastu.

**Anna Maria Joensen, bókhaldari**



Boðtænastan ljóðar sum eitt sera gott hugskot, men átti í veruleikanum at verið komin fyri longari tíð síðan.

Sum er, verða broytingar lýstar alt ov illa í fjølmiðlunum, og torført er at fylgja við.

Annars haldi eg, at umstøðurnar hjá illa gongdum fólki eru ræðuligar umborð á Dúgvuni, so hetta skuldu teir avgjørt eisini gjørt okkurt við.